Heðin Mortensen
løgtingsmaður

Nr. 90/2019

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um bakkaverju, nú søgurík kirkja, múrur og onnur fornminni í Kirkjubø eru um at farast av brimi, settur landsstýrismanninum í uttanríkis- og mentamálum, Jenis av Rana (at svara skrivliga eftir TS § 52a).

1. Nær kemur tørvsmeting av bakkaverju í Kirkjubø?
2. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrismaðurin um at gera bakkaverju í Kirkjubø?
3. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at brúka tilfar úr Sandoyartunlinum til endamálið?
4. Nær ætlar landsstýrismaðurin, at farast skal í gongd við at gera bakkaverjuna?

Viðmerkingar:

Ólavskirkjan í Kirkjubø er vard móti sjónum við einum verjumúri, sum er frá 1874. Gjøgnum ár og dag hevur brim máað burtur av múrinum, og tí er verjumúrurin sera illa farin.

Í 2018 varð aftur ein av mongu kanningunum gjørd á staðnum, og vísti hon, at tað loysir seg betur at gera verjumúrin av nýggjum heldur enn at gera ábøtur á gamla múrverkið. Haraftat varð mælt til, at brimbrótarar, ið ikki eru sjónligur, skuldu verða lagdir út longri úti á víkini.

Tunnilsfelagið, sum ger Sandoyartunnilin, hevur havt trupuleikar at sleppa av við grótið, og tí hevði tað verið upplagt at brúkt hetta grót til arbeiðið, sum liggur beint við síðuna av.

Vónandi kann landsstýrismaðurin koma til almennu Føroyar við einum góðum, greiðum boðskapi og eini loysn um ikki so langa tíð.

Á Løgtingi, 26. mai 2020

Heðin Mortensen